## Pauli tók met frá Páli

Pauli Øssursson Mohr úr Fuglafjarðar Svimjifelag setti um vikuskiftið nýtt føroyskt juniormet í 50 metra bringusvimjing. Tað gjørdi hann, tá SMS Christmas Sprint-kappingin var í Svimjihøllini í Havn. Pauli megnaði at svimja teir 50 metrarnar við tíðini 0.30.09 sekund, sum er 30 hundraðpartar betri enn gamla metið, sum Pál Joensen átti.



## Mjølnir-freistir longdar

Mjølnir skipar fyri Føroya Banka-kapping í flogbólti í Klaksvík fyri fyrst eldri deildir tann 16. og 17. januar 2010, og síðani fyri yngri deildir í tann 23. januar. Nú boðar flogbóltsfelagið í Klaksvík frá, at tilmeldingarfreistirnar til báðar kappingar eru longdar, so tey eldru skulu melda til í síðsta lagi 10. januar og tey yngru 17. januar. Tilmeldingin fer fram við annaðhvørt at senda teldupost til gaja@olivant.fo ella við at ringja á telefon 28 18 90. Mjølnir boðar somuleiðis frá, at tað ikki ber til at koma við fleiri liðum, tá freistin er farin.

### Neistin-H71 40-28 (23-16):

# Neistin flúgvandi móti finaluni

**Til tíðir vísti Neistin stórspæl, tá teir við knúsandi stórsigri á H71 mest sum vissaðu sær pláss í steypafinaluni**


jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk


Finnur Hansson og liðfelagarnir í Neistanum vóru bókstaviliga flúgvandi, tá teir leygardagin vundu burtur úr H71

Mynd: Álvur Haraldsen

Spenningurin gjørdist ongan tíð tann stóri, tá Neistin og H71 spældu fyrru hálvfinaluna sínamillum í steypakappingini í manshondbólti.

Neistin er í løtuni einsamalt oddalið í bestu deildini, og teir brúktu stóran part av dystinum til at prógva, hví so er. Og samstundis prógvaði H71, hví tað var í vár – og ikki komandi vár – at teir kundu rópa seg Føroya besta hondbóltslið.

### Bíleggja andlitsmáling

Fyrstu 10 minuttirnar ella so hekk H71 so dánt í Neistanum, men so skrædnaði av álvara. Spælarar fyri spælarar hevur Neistin eitt krútsterkt lið, og bara hetta í sjálvum sær ber við sær, at teir altíð eru ein stórur biti hjá mótstøðuni. Og tá ferðin so eisini verður hildin støðugt í topp, soleiðis sum hon varð tað leygardagin, er ikki stórvegis, sum hini liðini fáa gjørt.

Hoyvíkingar megnaðu í øllum førum sjáldan at venda sær, áðrenn bólturin aftur var í netinum, og 23 mál í fyrra hálvleiki siga sína søgu um tað, sum teir bláu løgdu fyri dagin.

Eftir steðgin var ferðin ikki heilt tann sama, men hoyvíkingarnir vóru ongan tíð serliga nær nøkrum, sum líktist spenningi. Teir hingu við høvdinum, og tí hevði Neistin ikki stórvegis trupulleikar við at sementera sigurin, sum at enda gjørdist somikið trivaligur, at teir longu nú kunnu bíleggja sær pláss í høllini og útgerð til andlitsmáling, tá februar mánaður byrjar.

## FAKTA

**Neistin-H71 40-28 (23-16)**
**10 min:** 7-5
**20 min:** 16-8
**40 min:** 26-20
**50 min:** 31-25
**Málskjúttar**
**Neistin:** Heini Hanusarson 7, Jugoslav Djumic 7, Finnur Hansson 6, David Edvardsen 6(1), Karl Oddmar Rasmussen 4(4), Finnur Hansson 3, Sjúrður Thomassen 2, Ingi Olsen 2, Jens Mohr 2, Dejan Lacok 1
**H71:** Poul Kjartan Dam 8(2), Janus Sørensen , Dánjal Tórgarð 4, Bárður Brimvík 3, Esbern Paturson 2, Gunnar Bláberg 2, Tróndur Vatnhamar 1, Ari Olsen 1, Rógvi Sørensen 1
**Brotskøst:** Neistin 6, H71 4
**Útvísingar:** Neistin 1, H71 6
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

### VÍF-Kyndil 22-26 (13-13):

# Kyndil vann greiðan fyrimun

**Allar súður eru ikki syftar enn, men mansfinalan líkist í stóran mun eini endurtøku av finaludystinum í februar**


jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Mansfinalan í vár gjørdist eitt satt brak. Ikki fyrr enn í sekundunum av dystinum kundi Neistin kenna seg vissan í sigrinum, tá Dejan Lacok bjargaði brotskasti, tá hann fyri einastu ferð í dystinum nart við bóltin.

Um tað verður eins spennandi um hálvan annan mánað, skal vera ósagt, men alt bendir á, at finalutakararnir verða teir somu.

### Tvey mál í eitt korter

Kyndil gjørdi í øllum førum sítt, tá teir vitjaðu í Vestmanna leygardagin. VÍF hevur havt tað tungt í ár, men sigurin móti H71 lyfti sjálvsálitið væl og virðiligа, og allan fyrra hálvleik var talan um sera intensa uppgerð, sum sømdi seg teimum báðum arvafíggindunum.

Fyrstu løtuna eftir steðgin skrædnaði tó fullkomuliga. Fyrsta korterið fekk VÍF bara tvey mál, og hóast eitt time-out fekk teir nakað inn aftur í dystin, so var hetta mønustingurin, sum teir ongan tíð av álvara komu seg yvir.

Eitt skifti var munurin uppi á seks málum, men tað eydnaðist hóast alt hjá vestmenningum at avmarka hendan munin til fýra mál. Um tað so er nóg mikið til at skapa spenning í retur-uppgerðini, er eitt annað mál. Fyribils er staðfestingin í øllum førum, at Kyndil stendur við einum beini í finaluni, og so fæst at síggja, um jóladøgurðin hevur verið nakað ríviligur hjá øðrum partinum, tá seinna hálvfinalan skal spælast annan jóladag.

## FAKTA

**VÍF-Kyndil 22-26 (13-13)**
**10 min:** 7-4
**20 min:** 11-8
**40 min:** 15-16
**50 min:** 17-21
**Málskjúttar**
**VÍF:** Regin Joensen 6, Bjarti Hansen 5, Sámal Joensen 3(1), Áki G. Olsen 3(2), Niels Andreasen 2, Sjúrður Poulsen 2, Áki Olsen 1
**Kyndil:** Høgni Klein 6, Janus Einar Sørensen 4, Hans Áki Dal-Christiansen 4(3), Ken Zacariassen 3, Tummas Pauli Hanusarson 3, Høgni Klein-Olsen 2, Bárður Johannesen 2, Josef Abrahamsen 1, Julian Johansen 1
**Brotskøst:** VÍF 5, Kyndil 4
**Útvísingar:** VÍF 3, Kyndil 1
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason